Álit

í

løgtingsmáli nr. 61/2020: Uppskot til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 30. november 2020 og eftir 1. viðgerð 2. desember 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 7., 8., 9. og 10. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Runavíkar kommunu, Tórshavnar kommunu og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Eysturoyartunnilin verður tikin í nýtslu fyrst í 2021, og merkir tað økta ferðslu eystaru megin við Skálafjørðin. Fyri at betra um ferðsluviðurskiftini til og frá tunlinum ígjøgnum Runavík, Saltangará og Glyvrar, verður nýggjur Fjøruvegur gjørdur at leiða serliga ta tungu ferðsluna til og frá Eysturoyartunlinum burtur frá høvuðsgøtuni í Runavík. Fjøruvegurin, sum er á leið 2,5 km, verður eftir ætlan gjørdur frá rundkoyringini á Rókini, fram við fjøruni og havnarlagnum í Runavík til Bakkavegin á Glyvrum. Nýggjur betongtunnil verður eisini gjørdur framvið Rókavegi og undir Løkin og Heiðaveg, og kemur upp við Gulasteinsveg.

Avtala er gjørd soleiðis, at landið veitir ein stuðul á 55 mió. kr. til verkætlanina. Gerst verkætlanin dýrari, eru tað framvegis 55 mió. kr., ið landið veitir í stuðli til verkætlanina. Verkætlanin er kommunal, soleiðis at Runavíkar kommuna fremur verkætlanina og hevur eftirfylgjandi ábyrgd av henni. Avtalan er treytað av, at Løgtingið samtykkir hetta uppskot til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg, og at Runavíkar býráð samtykkir hesa avtalu.

Nevndin fegnast um, at avtala er gjørd millum Runavíkar kommunu og landsstýrið um Fjøruvegin. Samstundis vil nevndin gera vart við, at alneyðugt er at fáa loysn á málinum um innkomuvegin til Tórshavnar, nú tunnilin letur upp fyrsta dagin. Nevndin heitir á landsstýrið um at bera skjótt at og koma í Løgtingið við málinum um innkomuvegin til Tórshavnar so ein endalig loysn fæst á hesum átrokandi máli.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2020

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Ruth Vang	